

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 02 - 2012

# Cosl Pioneer á Glitnefeltið áðrenn kós setast móti Føroyum

Kinesiski boripallurin, Cosl Pioneer, sum skal bora á føroyska landgrunninum í summar, fer nú undir sína seinastu uppgávu, áðrenn kósin loksins verður sett móti Brugduleitimiðinum á landgrunninum. Norska oljufelagið Statoil, sum hevur langtíðarleigað boripallin, hevur júst fingið játtan frá norsku oljumyndugleikunum at brúka pallin til eina størri arbeiðsuppgávu á framleiðandi Glitne oljufeltinum í Norðsjónum. Her skal pallurin m.a. bora ein framleiðslubrunn. Arbeiðið er sett til at byrja 29. februar og fer at taka umleið 106 dagar. Eftir tað setir pallurin kós móti Føroyum, har hann skal bora Brugdan 2 brunnin fyri Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum. Eingin dagur er ásettur enn, nær sett verður á føroysku undirgrundina, men tað verður so í summar, møguliga í juni ella juli. Boringin í Føroyum er sett til at taka heilar 130 dagar. Borað verður á millum 400 og 500 metra dýpi og farið verður millum 4000 og 5000 metrar niður. Bæði í Førohyum og í Noregi verða nú gjørdar fyrireikingar til at fara undir drúgvu føroysku boringina í summar, sum eftir øllum at døma fer at vera ein tann drúgvasta og mefst kostnaðarmikla á landgrunninum, síðani farið varð at bora fyri meira enn 10 árum síðani. Nýggi kinesiski boripallurin er ein av fýra pallum, sum verða bygdir til europeiska marknaðin. Næsti pallurin, Cosl Innovater er á veg til Europa úr Kina. Við umborð á honum eru einir 25 føroyskir handverkarar, sum arbeiða hjá Pam Offshore. Teirra uppgáva er gera pallin lidnan.